LM-082/2014

HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Løgmansskrivstovan
Postboks 64
110 Tórshavn

2. februar 2015
**Mál**: 15/00082-2
**Tygara Skriv**: 0643-003/14-1
**Viðgjørt**: Jóanes N. Dalsgaard

**Viðmerkingar til uppskot til samtyktar um at góðkenna norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd frá 12. juni 2012**

Heilsumálaráðið hevur við skrivi dagfest 19. januar 2015 fingið til hoyringar frá Løgmansskrivstovuni *Uppskot til samtyktar um at góðkenna norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd frá 12. juni 2012.*

Í skrivinum frá løgmansskrivstovuni verða stjórnarráðini biðin um:

1. at kanna um norðurlendski sáttmálin um sosiala trygd frá 12. juni 2012 krevur lógarbroytingar, fyri at sáttmálin kann vera útintur;
2. at lýsa, hvørjar umsitingarligar og fíggjarligar avleiðingar mett verður, at sáttmálin hevur fyri avvarðandi málsøki.

**Ad. 1**
Heilsumálaráðið metir ikki, at tað er neyðugt at broyta nakra lóg undir málsræði Heilsumálaráðsins, fyri at norðurlendski sáttmálin um sosiala trygd frá 12. juni 2012 kann vera útintur.

**Ad. 2**
*Fíggjarligar avleiðingar:*
Við tað, at persónsskarin verður víðkaður til, umframt ríkisborgarar í Íslandi, Noreg, Finnlandi, Svøríki og Danmark, eisini at fevna um ríkisborgarar úr ES-londum, sum eru búsitandi í einum av Norðanlondunum, kunnu útreiðslunar hjá føroyska heilsuverkinum, sum standast av at uppfylla skyldurnar í art. 7 í sáttmálanum, økjast. Mett verður ikki, at talan verður um stóra øking í útreiðslunum beint nú, men hetta kann broytast í framtíðini.

*Umsitingarligar avleiðingar:*
Við tað, at persónsskarin verður víðkaður til, umframt ríkisborgarar í Íslandi, Noreg, Finnlandi, Svøríki og Danmark, eisini at fevna um ríkisborgarar úr ES-londum, sum eru búsitandi í einum av Norðanlondunum, kann umsitingarliga byrðan, sum stendst av at uppfylla skyldurnar í art. 6 í Administrativ aftale til nordisk konvention om sosial sikring, veksa. Mett verður ikki, at talan verður um stóran vøkstur í umsitingarligu byrðuni beint nú, men hetta kann broytast í framtíðini.

Vinaliga

Jan Simonsen, deildarstjóri

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: hmr@hmr.fo